# Fundur í Hvalbiar sóknar kommunu hin 20. jan. 2011

Møtt vóru: Otto West, Trygvi Midjord, Martin í Nesi, Herdis Jensen, Rúni Thomsen og Niels J. Thomsen. Niels Olaf Eyvindsson hevði forfall.

Fundurin varð settur kl. 18.00.

1. **Umsókn um stuðulskeyp av stakfløgu.**
   Samtykt varð ikki at stuðla.

2. **Umsókn um stuðul til leingjan av bátadráttinum á Bíargarði.**
   Samtykt varð at játta kr. 29.200,- við MVG til endamálið og skulu rokningarnar fyri tilfarið sendast Hvalbiar Kommunu.

3. **Stuðul til Royn, ungdómstilboð og eldrahugnan.**
   Samtykt varð at stuðla Royn við kr. 200.000,- sum áður og at kommunan í samráð við Royn setir eitt umsjónarfólk og at taka sær av ungdómsarbeiðinum. Eldrahugnin fær kr. 25.000,- og Ranhøll kr. 40.000,-.

4. **Umsókn frá Tvøroyrar Bóltfelag um loyvi at brúka vøllin í Hvalba.**
   Samtykt varð, at Trivnaðarnevndin tekur ein fund við TB og Royn um brúk av vøllinum

5. **Skriv frá Sp/f við Bakkhús viðv. vegveitini frammanfyri handlinum.**
   Samtykt varð, at Vega- og Havnanevndin setir seg í samband við Landsverk, soleiðis at málið verður loyst.

6. **Skriv frá Niels Paula Hammer.**
   Samtykt varð, at Vega- og Havnanevndin tekur sær av málinum.

7. **Skriv frá eigarum av neystum v.m.**
   Í sambandi við ætlaðu útbyggingarnar á havnarlagnum eru nú skriv innkomin frá øllum. Sam tykt varð, ístaðin fyri løgfrøðing at fáa HMP-Consult at gera eina virðismeting av øllum bygningunum.

8. **Fyrispurningur viðv. byggiloyvi á matr. nr. 170c í Hvalba.**
   Halltóra og Jákup J. Joensen spyrja um møguleikan at byggja eini sethús uppi yvir skúlanum á matr. nr. 170c. Samtykt varð, at Tekniska nevnd setir seg í samband við tey hesum viðvíkjandi.

9. **Spillivatnsætlanin**.
   Kort yvir Hvalba og Nes. Kort yvir Sandvík er ikki liðugt enn. Kemur fyri á komandi fundi aftur, har ein nágreinilig frágreiðing fyriliggur.

10. **Mál beind í nevnd síðani síðsta fund:**

**Tekniska nevnd:**
Umsókn um byggiloyvi til íbúð aftrat verandi sethúsum á matr. nr. 190a í Hvalba.

11. **Málsviðgerð síðani síðsta fund:**

**Tekniska nevnd:**
Viðvíkjandi umsókn um byggiloyvi til íbúð á matr. nr. 190a varð samtykt at geva byggiloyvi.

Kunnað varð um ymisk mál.

Fundarbókin lisin og skrivað undir.

Fundurin lokin kl. 19.30.